LM-018/2023

Fylgiskjal 2

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Fíggjarmálaráðið
fmr@fmr.fo

Tórshavn 25. september 2023

Okkara tilv./Our ref.:
4989-3994/Niels/Fxroya-FAG-B-U
Tykkara tilv./Your ref.:

Ummæli av broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum

Vinnuhúsið skal innleiðandi gera vart við, at broytingaruppskotið til lógina um avgjøld við skráseting av motorakførum ikki er sent til hoyringar hjá Vinnuhúsinum. Tað er av stórum týdningi, at Fíggjarmálaráðið tryggjar sær, at viðkomandi partar verða hoyrdir, tá rættarreglur verða broyttar. Hetta er eisini ásett í rundskrivinum um lógarsmíð frá 2019.

Endamálið við lógaruppskotinum er sambært viðmerkingunum at hækka skrásetingargjaldið á el- og vetnisbilum, so avgjaldsfrítøkan fyri "luksusbilar" verður broytt. Vinnuhúsið skal til hetta viðmerkja, at um allir el- ella vetnisbilar, sum hava eitt avgjaldsskyldugt virði á meira enn kr. 200.000, eru luksusbilar, so er tað at einans ein lítil partur av skrásettu elbilunum seinastu 10 árini, sum ikki eru luksusbilar. Hetta sæst eisini í hagtølunum í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Broytingarnar fara tí sum heild at dýrka um elbilar og harvið minka um eftirspurningin eftir teimum.

Vinnuhúsið heldur tað vera óheppið, at avgjøldini á el- og vetnisbilar, sum longu eru broytt einaferð fyrr í ár, nú aftur verða broytt við stuttum skotbrái. Tað tykist sannlíkt, at henda knappliga broytingin hevur samband við fíggjarlógararbeiðið fyri 2024, tí tað verður í viðmerkingunum ikki grundgivið fyri, hví tað longu nú er neyðugt at víkja frá teimum broytingum í skrásetingargjøldunum, sum vórðu samtykt í februar í ár.

Í viðmerkingunum til uppskotið hevur Fíggjarmálaráðið ikki nágreinað tær avleiðingar, ið kunnu standast av uppskotinum. Eingin útrokning er í viðmerkingunum av væntaðu fíggjarligu avleiðingunum fyri tað almenna, og í avleiðingum fyri vinnuna stendur bert at "lógaruppskotið kemur helst at hava ávísar neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna."

Í brotinum í almennu viðmerkingunum um millumtjóða sáttmálar stendur, at lógaruppskotið ikki hevur ávirkan á stuðulin til grønari flutningsloysnir, men at lógaruppskotið málrættar lægra virðisgjaldið til fyrst og fremst bíligari ravmagns- og vetnisakførini. Vinnuhúsið skilur ikki heilt hesa orðing, tí avgjaldshækkingin sannlíkt kemur at ávirka kostnaðin av størsta partinum av teimum elbilum, sum eru á marknaðinum longu frá 1. Januar 2024.

Vinnuhúsið heldur, at Fíggjarmálaráðið eigur at fara meira grundleggjandi til verka og brúka meira tíð uppá at fyrireika evt. broytingar í avgjaldslóggávuni fyri skrásetingarskyldug akfør. Í slíkum fyrireikingum kundi eisini verið roknað uppá, hvussu

stóra CO2-sparing vit fáa av avgjaldsfrítøkuni av el- og vetnisbilum og um tað er mest kostnaðareffektivi hátturin at minka um útlátið av veðurlagsgassum.
Vinnuhúsið hevur fyrr eftirlýst samfelagsbúskaparligar útrokningar av átøkum á veðurlagsøkinum, so tað sæst, hvørji átøk geva størst sparing í útlátinum í mun til samfelagsbúskaparliga kostnaðin (kostnaðareffektivastu tiltøkini).

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Niels Winther

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo